## UTTAN ÚR HEIMI

# -Eg ætlaði at broyta heimin við at myrða forsetan

**Tann 25 ára gamli Maxime Brunerei ætlaði at myrða franska forsetan, Jacques Chirac, men skot hansara rakti ikki.**

MORÐROYND
*Árni Joensen:*

Tá hann sá, at skot hansara hevði ikki rakt forsetan, ætlaði Maxime Brunerei eftir øllum at døma at skjóta eitt skot afturat, men tað eydnaðist fólki, sum stóðu hjá, at taka rifluna frá honum. Løtu seinni tók løgreglan mannin, rifluna og ein guitarkassa, sum hann hevði fjalt rifluna í, tá hann kom til skrúðgonguna.

Stutt eftir tilburðin, sum var tætt við Sigursbogan í París, segði trygdarráðharrin Patrick Devedijan, at maðurin undir avhoyringum hevði viðgingið, at hann hevði havt sum mál at myrða forsetan undir skrúðgonguni, sum var í sambandi við franska tjóðardagin.

-Eg ætlaði mær at broyta heimin, og fyrsta stigið var at myrða forsetan fyri at fáa broyting í Fraklandi fyrst, skal maðurin hava sagt við løgregluna, sum longu beint eftir tilburðin upplýsti, at Maxime Bruneri er limur í einum høgrasinnaðum studentafelagsskapi, og at hann fyrr hevur verið virkin í nýnazistiskum felagsskapum.

Í gjár varð upplýst, at tann 25 ára gamli maðurin var lagdur inn á eitt sinnissjúkrahús til kanningar.

Tey flestu, sum hugdu at skrúðgonguni á Champs-Élysées, varnaðust als ikki tað, sum hendi, og skrúðgongan við umleið 6000 hermonnum og øðrum helt fram, sum um einki var hent.

Í einari samrøðu, sum franskt sjónvarp hevði við Jacques Chirac sunnukvøldið, varð heldur einki gjørt burtur úr tilburðinum.



*Ein løgreglumaður við guitarkassanum, sum Maxime Bruneri nýtti til at fjala rifluna í. Løgreglumaðurin aftanfyri stendur við rifluni.*

# Drápsmaðurin hjá Daniel Pearl dømdur til deyða

**Sheikh Omar, sum er føddur í Bretlandi, er dømdur til deyða fyri at hava burturflutt og myrt amerikanska tíðindamannin Daniel Pearl.**

PAKISTAN
*Árni Joensen*

Ein dómstólur í Pakistan kunngjørdi í gjár, at hann hevði dømt Ahmed Omar Saeed Sheikh Adil ella Sheikh Omar til deyða fyri at hava rænt og myrt amerikanska tíðindamannin Daniel Pearl í Karachi í januar í ár. Tríggir av hjálparmonnum hansara fingu lívlanga fongsulsrevsing.

Beint aftan á úrskurðin hjá dómstólinum svór Sheikh Omar, at dómurin verður hevndur. Hann legði pakistansku myndugleikarnar undir at hava givið dómstólinum boð um, hvør revsingin skuldi verða.

-Vit fáa at síggja, hvør doyr fyrst, eg ella teir, sum hava givið boð um dómin, segði Sheikh Omar aftan á úrskurðin.

Í Pakistan er vanligt, at deyðadømd verða hongd.

# Charles kann gifta seg aftur

**Maðurin, sum eftir øllum at døma verður næsti erkabiskupurin í Canterbury, fer at góðtaka, at Charles prinsur kann gifta seg við Camillu Parker Bowles.**

BRETLAND
*Árni Joensen*

Rowan Williams, sum er erkabiskupur í Wales, verður hildin at vera tann, sum hevur bestu møguleikarnar at taka við eftir George Carey sum erkabiskupur í Canterbury og leiðari í anglikansku kirkjuni.

Sambært blaðnum Sunday Telegraph skal Rowan Williams hava sagt, at Charles prinsur og vinkona hansara Camilla Parker Bowles eiga at fáa somu sømdir sum øll onnur, og at tey tí eisini eiga at koma undir reglurnar, sum loyva fráskildum at gifta seg aftur. Higartil hava teir einstøku prestarnir sjálvir gjørt av, um teir vilja víga fólk, sum eru fráskild.

Formliga er einki í vegin fyri, at Charls prinsur kann gifta seg uppaftur í kirkjuni, men tað at móður hansara, Elizabeth drotning, hevur evstu leiðsluna í anglikansku kirkjuni, hevur í veruleikanum forðað tí.

Anglikanska kirkjan hevur sum so ikki lagt seg út í eitt møguligt giftarmál hjá Charles prinsi, men kirkjuleiðarar hava tó sagt, at tað hevði verið betur hóskandi, at tann komandi kongurin er giftur, heldur enn at hann livir ógiftur saman við unnustu síni.



# Latið flogvøllin verða verandi

**Tað er eingin grund til at flyta flogvøllin úr Vágum, heldur flogskipari, sum regluliga hevur flogið til Føroya síðan 1970. Tað kostar nógv, og vindur er eisini aðrastaðni í Føroyum, vísir hann á**

FLOGFERÐSLA
*Edvard Joensen*



*Eftir at hava flogið regluliga til Føroya í meira enn 30 ár, gevst ein tann royndasti flogskiparin hjá Maersk Air. Hann var í Føroyum fyri seinastu ferð leygardagin*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Flogvøllurin:** Tað er eingin grund at leggja flogvøllin aðrastaðni enn har, hann liggur í dag, sigur Dan Johnson, flogskipari hjá Maersk Air, sum hevur fogið til Føroya síðan 1970.

Tað er rætt, at tað er vindhart viðhvørt, her vøllurin er, ásannar hann. Men tað er tað eisini aðrastaðni. Bæði í Føroyum og uttanlands, og slíkum mugu vit so hava fyrilit fyri. Júst á sama hátt, sum gjørt verður á sjónum, vísir royndi, danski flogskiparin á.

Dan Johnson, flogskipari hjá Maersk Air, lendi seinasta leygardag fyri seinastu ferð í Føroyum við rutuflogfarinum úr Keypmannahavn. Hann fer nú frá við eftirløn.

Dan Johnson greiðir frá, at hann fleyg fyrstu ferð til Føroya sum stýrimaður í 1970. Síðan fleyg hann av og á, til Maersk Air byrjaði regluliga flúgving 1. mars 1971.

Fyrsta túrin sum flogskipari fleyg hann við einum Fokker Friendship tann 20. oktober 1972, og hevur hann síðan flogið regluliga á Føroyarutuni hesi 30 árini, sum farin eru síðan tá.

Dan Johnson er ivaleyst tann, sum longst hevur flogið regluliga upp á Føroyar. Hann heldur ikki, at flogvøllurin í Vágum er ótryggari enn aðrir flogvøllir.

– Um so var, varð hann ikki góðkendur til ferðafólkafluting, vísir hann á.

– Tað er greit, at tá flúgvast skal inn gjøgnum ein fjørð, sum gjørt verður her, verða vindviðurskiftini eitt sindur serlig. Tað eiga vit at vita og rokna við, eins og vit eiga at hava virðing fyri tí, sigur hann.

Men at flyta vøllin úr Vágum og leggja hann aðrastaðni í Føroyum sær hann ikki sum nakra góða loysn. Bæði tí at veðurlíkindini eru ikki so øgiliga ólík á ymsum støðum í Føroyum, og tí at tað er sera dýrt at gera ein nýggjan vøll, vísir hann á.

Dan Johnson sigur, nú hann gevst, at hann minnist ikki aftur á nakran serliga túr soleiðis. Onkrir vánaligir hava verið, men eingin, sum hevur verið so burturúr, at hann kann peika á nakran ávísan.

Nú hann gevst at flúgva, fer Johnson, sum tey nevna hann á flogvøllinum í Vágum, at sigla. Hann eigur seglbát, greiðir hann frá, og við honum fer hann nú fyrst til Karibia og síðan út í Kyrrahavið. So fer tíðin at vísa, hvar hann endar, sigur hann.

bobcat® -maskinurnar sum halda!
• Gravmaskinur –nógv model
• Lessarar við óteljandi møguleikum!
Vælegnaðar til byggivirkir, entrepenørar, bøndir, jarðarbrúk o.a.

Keyp góðsku – keyp Bob Cat!
Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008
Sosialurin - 311820

AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
Hýra bil - ring 311234
BENZIN
DIESEL
KIOSK

AUTO
311234

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo